# Tóku trygdina frá suðuroyingum

**Smyril er ein partur av tilbúgvingini í Suðuroy og borgarstjórin á Tvøroyri er sera misnøgdur við, at hann verður lagdur í Havn nú hann segði frá ódnarveðri síðstu nátt**

TILBÚGVING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað líkist ongum, at Smyril verður lagdur í Havn í nátt.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, er sera misnøgdur við, at Smyril varð lagdur í Havn, nú hann segði frá ódnarveðri síðstu nátt.

Smyril fór úr Suðuroy klokkan 15.30 í gjár, eftir ferðaætlanini. Men longu á miðdegi í gjár, boðaði Strandferðslan frá, at av tí at hann boðaði frá ódn, sigldi hann ikki suður aftur klokkan 19 í gjárkvøldið eftir ferðaætlanini.

Ístaðin skuldi hann sigla suður klokkan 7 í morgun árini og so norðuraftur klokkan 9.30.

Men síðani varð fráferðin úr Havn aftur útsett til klokkan 13.30 í dag.

### Mistu trygdina

Hetta er fallið borgarstjóranum á Tvøroyri fyri bróstið.

– Smyril er ein týðandi partur av tilbúgvingini hjá Suðuroynni. Fyri trygdina hevur tað stóran týdning, at hann liggur í Suðuroy og tí eigur hann ikki at verða tikin frá okkum, sigur Kristin Michelsen.

– Vit hava bygt skip fyri næstan 300 milliónir og nýggja Havn í Suðuroy fyri 60 milliónir, so tað er heilt óskiljandi, at hann ikki kann liggja har, men verður tikin frá okkum, nú boðað var frá ódnarveðri.

Hann spyr eisini um tað yvirhøvur kann góðtakast, at vit hava bygt eina havn fyri 60 milliónir, sum skipið ikki kann brúka í øllum veðri.

Hann sigur, at nú hann segði frá ódn, hevði tað verið sjálvsagt, at Smyril varð liggjandi í Suðuroy í nátt, skuldi ein neyðstøða tikið seg upp í óveðrinum.

– Var ikki siglandi, var ongin orsøk at siglt norður seinnapartin í gjár, leggur hann afturat.

Við tað, at Smyril varð liggjandi í Havn í nátt, er trygdin sostatt eisini tikin frá suðuroyingum í eini møguligari vandastøðu og tað kunnu vit ikki góðtaka.

– Tók ein neyðstøða seg upp í Suðuroy í ódnarveðrinum síðstu nátt, minkaðu møguleikarnir at fáa hjálp, munandi, tá ið Smyril lá í Havn.

– Tí skuldi hann heldur ligið í Suðuroy í nátt, tí vit eru hóast alt tað økið, sum eru longst burtur frá Landssjúkrahúsinum.

Borgarstjórin á Tvøroyri fer tískil at taka spurningin upp, bæði í Tvøroyrar Kommunu, men eisini við hinar kommunurnar í Oynni, umframt við bjargingarfeløg og onnur í hava við trygd og hjálpararbeiðið at gera.

– Hetta mugu vit øll mótmæla í felag, so at tað ikki hendir aftur, sigur hann.

Í fyrstu syftu hevur Tvøroyrar Býráð samtykt at senda Strandferðsluni skriv, har tað verður mótmælt, at Smyril varð lagdur í Havn, tá ið boðað varð frá óveðri, samstundis sum Býráðið vil hava Strandfersðluna at bera so í bandi, at tað ikki hendir aftur.

Seinni verður so málið tikið upp við aðrar partar, sum hava við tað at gera.




*– Tað hevði verið ein stór trygd í at havt Smyril liggjandi í Suðuroy, nú hann boðaði frá ódnarveðri síðstu nátt. Tí kann tað als ikki góðtakast, at Strandferðslan hevur gjørt av at leggja hann í Havnini, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.*

# Trygdin hjá Smyrli í vanda í Suðuroy í nátt

**– Vit mettu ikki, at Smyril hevði ikki ligið nóg trygd í nýggju samferðsluhavnini í Suðuroy í slíkum veðri, sum boðað varð frá síðstu nátt og tí varð gjørt av at leggja hann í Havn**

TILBÚGVING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ein stórur trupulleiki, at vit toku trygdina frá suðuroyingum síðstu nátt. Men vit mugu eisini hugsað um trygdina hjá Smyrli.

Tað kemur ikki óvart á Kristian Davidsen, stjóra á Strandferðsluni, at suðuroyingar gera vart við seg, nú Smyril varð lagdur í Havn, nú hann boðaði frá ódn síðstu nátt.

Ein, sum ikki ætlar at lata tað fara afturvið borðinum, at suðuroyingar mistu trygdina, nú boðað varð frá ódn síðstu nátt, er borgarstjórin á Tvøroyri



*– Tað er ein stórur trupulleiki, at trygdin verður tikin frá suðuroyingum í nátt, men vit hava eisini trygdina hjá skipinum sjálvum at hugsa um, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni*

Kristian Davidsen ásannar, at tað er stak óheppið, at Smyril varð lagdur í Havn, tá ið boðað varð frá ódn síðstu nátt, tí skuldi ein neyðstøða tikið seg upp, var Smyril ikki tøkur at hjálpa.

Men hann staðfestir eisini, at tey mugu eisini hugsa um trygdina hjá skipinum sjálvum.

– Skiparin metti ikki, at tað var nóg trygt hjá Smyrli at liggja í nýggju ferjuleguni í Suðuroy í slíkum líkindum, sum vóru væntandi síðstu nátt og tí gjørdi hann av at leggja skipið í Havn ístaðin, sigur Kristian Davidsen.

– Skiparin stúrdi fyri, at hann fór at slíta, leggur hann afturat.

Sum stjórin á Strandferðsluni hevur skilt tað, er metingin tann, at molin í ferjuleguni er ov stuttur til, at skipið kann liggja trygt í líkindum sum teimum, sum vóru væntandi síðstu nátt.

Metingarnar siga, at molin skuldi verið einar 20-30 metrar longur fyri at fáa havnina nóg trygga til veður sum tað, ið var væntandi síðstu nátt, leggur hann afturat.

## Røtt avgerð av skiparanum á Smyrli

**– Í slíkari ódn, sum varð fráboðað síðstu nátt, kann heldur ikki Smyril ger nakað, sigur skipari**

TILBÚGVING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skiparin á Smyrli tók eina rætta avgerð, tá ið hann gjørdi av at leggja Smyril í Havn síðstu nátt.

Tað sigur ein royndur skipari í Suðuroy, sum vit hava tosað við, men sum kortini ikki vil leggja navn til.

Hann sigur, at tá ið slíkur stormur er, sum tað var væntandi síðstu nátt, liggur Smyril ikki gott á Krambatanga, tí tað glaðar so ógvusliga, at vandi er fyri, at hann slítur og so kann tað gerast ein galin endi.

Hann sigur, at varð tann ódnin, sum væntandi var, kann heldur ikki Smyril gera nakað, hóast hann er stórur.

– Smyril kann kanska sigla ímillum, men hann kann ikki manøvrera trygt inni í eini havn og so ber heldur ikki til at sigla, tí skip og manning kunnu ikki setast í vanda heldur.

Fær hann eina hvirlu av teirri styrki, sum var væntandi, munar heldur ikki maskinkraftin hjá Smyrli nóg mikið til at hann kann manøvrera trygt inni í eini havn.

– Eitt er at veita hjálp. Men tann, sum veitir hjálp, má heldur ikki seta seg sjálvan og síni í vanda. Hendir eisiin nakað við hjálparanum, er onki vunnið, tí so er skaðin uppaftur størri.

– Ódnir sum hesar, ið vóru fráboðaðar í nátt, eru tívetur sjáldsamar og tað er onki at gera enn at góðtaka tær og at hava virðing fyri teimum og sostatt eisini at laga sítt virksemi eftir teimum. Skiparin vísir eisini á, at vit hava verulig bjargingarskiparskip, eitt nú Tjaldrið og Brimil, sum eru smíðað til endamálið og hjá teimum er lættari at manøvrera í ólíkindum enn hjá einum stórum ferðamannaskipi sum Smyrli.